## DAGSINS MEINING

# Vantandi virðing

Einaferð afturat mugu vit ásanna, at tað er líkt til, at danska stjórin drálar og dregur út ætlaðar samráðingar um yvirtøkur eftir tí nýggja sjálvstýrisleistinum hjá landsstýrinum.

Víst hevur landsstýrið fingið positiv svar frá donskum ráðharrum, sum siga seg sinnaðar at samráðast um ynski føroyinga at yvirtaka skúlamál og almannaforsorg. Men tað skuldi bara mangla, tí hetta eru mál á lista A í heimastýrislógini, sum skulu kunna yvirtakast eftir ynski føroyinga.

Øðrvísi er við løgregluni, sum er skrásett sum B-mál, og sum bert kunnu yvirtakast eftir samráðingar og semju millum partarnar. Herfyri visti Fregnir, at føroysku løgreglumenninir sluppu ikki við í fyrireikingarmar, og í síðstu viku visti Fregnir, at danska stjórnin nú sigur nei til at heimastýrið yvirtekur løgregluna.

Fregnir vísti ikki nakra skrivliga dokumentatión, men sambært Útvarpinum týskvøldið so er skrivliga grundgevingin, at vit kunnu ikki yvirtaka løgregluna, fyrr enn øll onur lóggáva viðvíkjandi dómsvaldi og rættarmálum er yvirtikin. Løgreglan, sum skal handheva lóg og rætt, kann ikki yvirtakast, fyrrenn lóggávan á hesum øki er vorðin føroysk.

Hetta tykist skilagott, men er kortini í andsøgn við tað, sum forsætisráðharrin áður hevur sagt - at vit kunnu yvirtaka løgregluna, um vit annars ynskja tað. Aftur eitt dømi um, at danska stjórnin sigur eitt, men ger eitt annað.

Og tí kunnu vit seta spurnartekin við, hvørja virðing danska stjórnin hevur fyri Føroyum og føroyingum. Orðini eru ofta føgur, men gerðirnar eru minni fagrar. T.d. í hernaðarmálinum, í bankakreppuni, í loyniarbeiðnum hjá "Føroya-bólkinum" og í kravboðunum á fiskivinnuøkinum, tá danska stjórnin sýndi gamlan kolonipolitikk í verki.

Líka mikið um vit taka undir við fullveldi, eru sambandssinnað ella vilja hava eina sjálvstýrislóg, mugu vit krevja, at danir sýna okkum virðing og virða okkum sum ein javnsettan part. Men tað tykist danska stjórnin ikki gera í løtuni!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tit eru størstu egoistar, ið stýrt hava

**Viðmerking til tingmenn í andstøðu og samgongu**

**Sólvit Simonsen**



Fríggjakvøldið 13. juli settist eg sum vant at hyggja at og lurta eftir Degi og viku. Jú, so sanniliga kemur hann ikki og fortelur, at løgtings- og landsstýrismenn hava hækkað pensión sína við yvirdosis tølum. Ja, fyrst nú hjá landsstýrismonnunum og síðan hjá løgtingsmonnum verður farið undir at hækka; ikki eitt orð um, hvar pengarnir skulu koma frá, tá er ovmikið í kassanum.

Til manningina á Teistanum tók tað tríggjar mánaðir at finna pengar til eitt so ansvarsfult arbeiði, sum teir hava, og síðan 36 tímar at sita út í eitt fyri at teir kundu fáa eina brúkiliga hýru.

Eg haldi tað vera skammiligt, at landsins kosnu menn skulu alla tíðina hugsa fyrst um seg sjálvan, ikki ein einasti mótmælir tá ið tað er at kradda til sín sjálvan.

Nú hava tit í eina heila tingsetu skula fingið eina brúkiliga pensión til tey eldru, men hvar er batin? 0,00!

Eg fyri mítt viðkomandi havi nú roynt at slitið meg ígjøgnum lívið. Faðirleysur 14 ára gamal, tá var ongin almenn hjálp; men bert tvær hendur við vøttum uppiá, sum skuldu klára dagligt breyð til seg og síni.

Síðan hevur man fram ígjøgnum lívið tíbetur havt eina somikið brúkiliga heilsu, at tað hevur gingið so nøkurlunda, stundum verri og stundum betur. Nú er tað komið til tað, at eg sjálvur eri blivin pensionistur, og hvat er so pensiónin, jú 3300 kr. um mánaðin og harav skulu 600 kr. gjaldast í skatti. Forkláringin er tann, at kona mín hevur ein handil, sum gevur nú í seinastuni 100.000 kr. í yvirskoti, men verður hon eisini nívd til jarðar í skatti.

Um so var, at man hevði gingið á almannastovuna alt sítt lív og hevað pengar, so er man vitandi um, at man hevði beinanvegin fingið hægstu pensión. So nú stendur akkurát soleiðis til í Føroyum, at tað eldra fólkið er fullkomiliga komið í neyð av tykkum, sum stýra skulu.

Eg fari at loyva mær at geva tykkum mítt ummæli bæði í andstøðu og sam gongu, og ljóðar tað soleiðis: Tit eru størstu egoistar, ið sitið hava við róðrið her á Føroya landi.

Síðani fari eg at loyva mær at broyta orðini hjá Harry Birtulíð, sála:

*Hví er tað í Føroyum so vorðið,*
*at hann, ið hevur byrðarnar borið*
*skal bidda sítt breyð*
*og liva í neyð.*
*Hví er tað í Føroyum so vorðið?*

# Sjálvstýrisflokkurin sigur seg hava gjørt nakað fyri fólkið og fyri pensjonistarnar, sum búgva í Suðuroy

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Við at lata standa til ella einki at gera, hevur samgongan tvinga útreiðslur yvir á kommunurnar

**Røktarheim og sambýli**
Hendan samgongan hevur einki gjørt viðvíkjandi røktarheimun og sambýlum, hóðast reypi um yvirskot uppá 4-600 mill. um ári, hevur verði óført tey seinastu 3 árini.

Hóast landi hevur ábyrgdina og pengarnar, hevur samgongan einki gjørt, men við at lumpa og lirka, hevur samgongan lagt útreiðslurnar á kommunurnar við at lata standa til.

Hendan mannagongd, við at lata standa til, gevur landinum sjálvsagt størri yvirskot, meðan kommunurnar mugu knógva undir størri og størri almannaútreiðslum, sum landi skuldi goldið.

**Pensjonistarnir**
Hvat Sjálvstýrisflokkurin, sum umsitur almanna-og heilsuverkið hevur gjørt fyri pensjonistarnar, eru pensjonistarnir best førir fyri at svara uppá, men seinasta dømi er, at eingin reingerð verður í summar vegna sparing.

Tíðindini í bløðunum um avlamispensjonistar í Suðuroy, sum noyðast at bíða í mánaðir og ár eftir, at avgerðir verða tiknar, er heldur ikki til nakran sóma fyri landstýrismannin í almanna-og heilsumálum.

**Gjørt nakað fyri fólkið í Suðuroy?**
Formaður Sjálvstýrisflokksins sigur, at tey so sanniliga hava gjørt nakað fyri fólkið í Suðuroynni:

- Selt Teistan av landinum, til stóran skaða fyri fólk og vinnulív í Suðuroy
- Tekur ikki undir við, at útjaðarin skal mennast t.d. við útgerðarhavn.
- Leggur upp til, at íløgur í samferðsluna (nýtt suðuroyarskip) skal minkast
- Leggur upp til, at kommunurnar skulu gjalda meira av almannaútreiðslum so at skattaprosentið má hækkast og harvið gera umstøðurnar hjá fólkið í kommununum munandi verri.

**Ákæran**
Tað er eingin tóm ákæra, at Sjálvstýrisflokkurin og samgongan prioriterar sjálvstýri fram um vælferð og serstakuliga vælferðina í útjaðarinum, har pensjonistar, avlamin og menningartarna eisini búleikast, tað hevur gongdin tey seinastu 3 árini víst, tí um viljin var til staðar kundi nakað av yvirskotinum á fíggjarlógini verði brúkt til oman fyri nevndu mál.

Gongdin tey seinastu 3 árini hevur eisini víst, at pengar eru tøkir, men viljin er ikki til staðar.

Livst, so spyrst.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Lesandi sakna kjak um ES

**Á árligu lestrararstevnuni hjá MFS komandi sunnudag verður roynt at seta hol á kjakið um hvat samband Føroyar eiga at hava við ES. Í hesum sambandi koma fólk úr Isle of Man og úr Íslandi at greiða frá sambandinum hjá hesum báðum londum við Europeiska Samveldið.**

*Rúnar Reistrup*

Ímeðan vøkur orð verða søgd um at føroysk lesandi eiga at fara út um tey donsku landamørkini at nema sær útbúgving, og nýggja Altjóða Skrivstovan verður sett á stovn, er tað ein sannroynd, at føroyingar renna seg í ein múr tá teir skulu nema sær útbúgving í einum ES landi.

Av tí at føroysk lesandi ikki eru ES borgarar og heldur ikki eru umfatað av nakrari serligari avtalu millum Føroyar og ES, kann tað gerast teimum ein sera dýr søga at nema sær útbúgving í londunum í Europa. Tí hóast føroyingar kunnu fáa ES pass og danskan ríkisborgararætt eftir einum degi, so kunnu føroyingar ikki gerast ES borgarar tey fyrstu nógvu árini.

Hetta hevur fingið fleiri føroysk lesandi í Danmark, ið søkja um upptøku á lærustovnum uttanlands, at káva yvir teirra føroyska uppruna og bert nevna at tey eru danskir statsborgarar fyri at fjala at tey ikki eru ES borgarar.

### Umstøðurnar eru vánaligar

Hendan trupulleika heldur Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) vera eina ta størstu forðanina ímóti at altjóðagera tey føroysku lesandi, soleiðis sum landsstýrið hevur stungið út í kortið, og tí hevur MFS nú tikið stig til at fáa málið á dagsskránna í Føroyum.

Á hvørjum ári skipar MFS fyri lestrarstevnu og í ár er júst sambandið millum Føroyar og ES evni á lestrarstevnuni.

Sissal Kristiansen, formaður í MFS, sigur, at felagið hevur hoyrt frá nógvum av sínum limum, sum brenna seg av at útbúgvingarstovnar í ES londum skilja neyvt millum hvørjir umsøkjarar eru ES-borgarar og ikki ES-borgarar.

– Fyri okkum at síggja er hetta ein stór forðing fyri at føroyingar fara út um Norðurlond at útbúgva seg. Tað er ikki nóg mikið at landsstýrið vísir góðan vilja og til dømis setir Altjóða Skrivstovuna á stovn, tá umstøðurnar at fara út í Europa at lesa eru so vánaligar hjá føroyingum, sigur MFS formaðurin.

### Føroyskur politikkur steðgar í Danmark

Ístaðin fyri at leggja Lestrarstevnuna til rættis eftir hesum rættiliga væl avmarkaða trupulleikanum hjá føroyskum lesandi, hevur MFS valt at taka allan tann prinsipiella spurningin um, hvussu Føroyar eiga at fyrihalda seg til ES upp.

– Tað tykist fyri mær sum at føroyski horistonturin endar í Danmark. Føroyskur politikkur snýr seg um loysing frá Danmark og so at siga einki annað. Loysingin er eitt umráðandi mál, men við loysingini verða ikki allir trupulleikar loystir, og tað mátti verið møguligt at farið í gongd við eitt kjak um hvat Føroyar vilja við ES, áðrenn loysingarspurningurin er greiddur. Tað eigur at vera møguligt at hava meira enn eitt mál í huganum ísenn, sigur Sissal Kristiansen, sum ásannar, at tað ikki átti at verið upgávan hjá MFS at byrja eitt kjak um føroyskan uttanríkispolitik sum heild.

– Men um eingin annar ger tað, so mugu vit taka málið upp, tí manglandi viljin millum føroyskar politikkarar at taka ES upp á tungu, er nakað sum vit lesandi merkja nógv til í gerandisdegnum, sigur Sissal Kristiansen, formaður í MFS.

### Gestir úr Álanadi og av Man

Til at seta málið um Føroyar og ES í perspektiv hevur MFS boðið umboðum frá tveimum øðrum smálandatjóðum til Føroya at røða á Lestrarstevnuni. Av Isle of Man kemur Stephen Carse, búskaparráðgevi í fíggjarmálaráðnum á Man, og úr Íslandi kemur Jón Sigurðsson úr íslendska handilskamarinum.

Á Lestrarstevnuni fer eisini Jens Helgi Toftum úr Fiskimálastýrinum at greiða frá viðurskiftunum millum Føroyar og ES, og Tommy Petersen, ið fyrr hevur verið nógv frammi í føroyska ES kjakinum fer eisini at koma við sínum viðmerkingum.

Lestrarstevnan hjá MFS verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 22.juli klokkan 15.00.

Føroya Banki, Føroya Tele, Atlantic Airways og Vestlax hava stuðlað tiltakinum fíggjarliga.



*– Tað er ikki nóg mikið at landsstýrið vísir góðan vilja og til dømis setir Altjóða Skrivstovuna á stovn, tá umstøðurnar at fara út í Europa at lesa eru so vánaligar hjá føroyingum, sigur MFS formaðurin*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Unn Paturson í Meiarínum



*Unn Paturson og bólkur hennara, sum fara at spæla í Meirínum í Havn í kvøld*
*Mynd: Sára Finsdóttir*

**Í kvøld fer Unn Paturson á pall í Meiarínum í Havn at framføra løg av fløguni, sum hon og Rógvi á Rógvu góvu út í januar mánað í ár**

KONSERT
*Rúnar Reistrup*

Fløgan við heldur sermerkta heitinum »Gloymska við Grape« hevur verið rímuliga nógv at hoyrt síðan hon varð givin út tíðliga í hesum árinum. Tað eru tey bæði Unn Paturson og Rógvi á Rógvi, ið standa aftanfyri fløguna og øll løgini á henni, og eitt vælmannað lið av frægum føroyskum tónleikarum hava verið við í upptøkuhølinum.

Á konsert, sum verður í Meiarínum í kvøld klokkan 20, fara Unn Paturson og ein bólkur, sum er samansettur til endamálið, at spæla løg av fløguni. Í bólkinum eru Finnur Hansen, keyboard, Herluf Lützen, guitar, Bjarki Meitil, bass, Brandur Jacobsen, slagverk, Rógvi á Rógvu, trummir og Malan Eyðunsdóttir og Anna Maria Olsen kór.

Hetta farna hálva árið hevur Unn Paturson millum annað havt onkra framførslu í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.